TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Deildarleiðari til Heimið fyri minnisveik

**Heimið við Vallalíð**

Heimið við Vallalíð er ein nýggjur bústovnur til fólk ið eru minnisveik, og verður tikið í nýtslu í summar.

À heiminum er pláss fyri 16 búfólkum á 2 eindum við 8 búfólkum á hvørjari eind.

Til Heimið við Vallalíð er eitt starv sum deildarleiðari leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er, við tilvísing til fyristøðufólkið á Ellis- og umlættingarheiminum, at vera dagligur leiðari á stovninum herundir at tryggja, at størst nytta fæst úr tillutaða tilfeinginum.

Deildarleiðarin skal tryggja, at dygd og samanhangur er í røktini og umsorganini. Hetta m.a. við at arbeiða eftir meginreglum og hugburði, sum leiðslan og starvsfólk hava viðgjørt saman.

Deildarleiðarin skal menna tænastustøðið m.a. við at undirvísa og vegleiða starvsfelagar, lesandi og næmingar.

**Kommunan roknar við at umsøkjarin**
- hevur relevanta útbúgving, t.d. sum sjúkrarøktarfrøðingur ella almanna- og heilsuatstøðingur
- hevur breiða heilsufakliga útbúgving
- hevur ella er sinnað/ur at fara undir eftirútbúgving sum demenssamskipari
- dugir væl at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur leiðsluroyndir og kunnleika til kunningartøkni
- hevur náttúrligan myndugleika og nýmótans leiðslustíl
- dugir at lurta eftir øðrum, men samstundis tori at skera ígjøgnum og taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Idu Sørensen, fyristøðufólk, tlf. 317339 ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mai 2005 kl. 12.00. Viðmerk á umsóknina: "Deildarleiðari"

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3727,** Sp/f MVL Consult, 600 Saltangará.
**Viðtøkur broyttar:** 18.04.2005
**Nýtt navn:** P/F MVL Consult
**Partapeningur:** Hækking við kr. 420.000,00 til kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 420.000,00 til kurs 104,76
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Hans Egil Olsen, Grannatún 5, 600 Saltangará (nevndarformaður)
Jan Olsen, 800 Tvøroyri (nevndarlimur)
Jónstein Olsen, 620 Runavík (nevndarlimur)
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanninum, ella nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi.
**Grannskoðari:**
**Farin frá sum grannskoðari:** Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, Gerðisvegur, Boks 90, 600 Saltangará
**Nýggjur grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn
**Endamál:** Endamál felagsins er at gera íløgur í partabrøv, veita ráðgeving, tænastur, gera undirvísingartilfar og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 04. mai 2005

Kristin Balle

SJÓVAR KOMMUNA

# Kunngerð

**um framløgu av broytingum av býarskipan.**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av býarskipan fyri Sjóvar kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 29. apríl til 20. mai 2005.

Møgulig mótmæli skulu vera skrivlig og vera kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 29. juli 2005.

**Sjóvar kommuna**

Gøtu Kommuna



# Vaskifólk til Gøtu kommunu

Søkt verður eftir vaskifólki at vaska í Gøtu Skúla og øðrum hølum kommununnar.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 441012.

Skrivlig umsókn má vera kommunuskrivstovuni í hendi innan týsdagin tann 17. mai kl 12.

**Gøtu kommuna**
Postboks 40
510 Gøta

# HANDILSLÆRLINGUR

Vit sóknast eftir lærlingi til Málingadeildina hjá P/F Litaval á Hjalla.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi yrki, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

Vit vænta at tú ert røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnu, men hetta er tó ikki ein treyt.

Seinasta freist er at senda inn umsókn við prógvum, er Sunnudagin tann 17. mai 2005.

Eru spurningar eru tygum altíð vælkomin at ringja á tlf 342513.

**P/F Litaval**
**Box 1019**
**100 Tórshavn**




# GSM telefonir &

## GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

Storno
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

JAVNI

# Javna veitslan

Verður á Hotel Føroyum

**Leygardagin 28. mai 2005**
**kl. 18.00**

Døgurði
Undirhald
M'as spælir til dans

Kostnaður: Vaksin kr. 250,-
Børn 6-14 ár: kr. 125,-
Yngri børn ókeypis

Tilmelding í seinasta lagi 23. mai á tlf. 314827
Teldupostur: javni@post.olivant.fo

Øll eru hjartaliga vælkomin

**Javni**